## Hósdagur 10. januar

**SVF**

Hósdagur 10. januar 2002
18.25 DV í kvøld
18.30 Jumanji 34
19.00 FÍA og POUL (e) - Sólstrondin - Dalurin
20.00 Dagur og Vika við Kjak
20.45 Ally McBeal 19 - amerikonsk røð
21.30 Syngið ein sang - donsk undirhalddsending
22.40 Krimitímin: Undir illgruna 1:4
23.30 Vald andanna
00.15 Liðugt

**EUROSPORT**

7.30 Rally - 2002 Total-Dakar
8.00 Sailing - Ocean Race
8.30 Nordic Combined Skiing - World Cup
10.00 Rally - 2002 Total-Dakar
10.30 Biathlon - World Cup
11.30 Biathlon - World Cup - Live
12.45 Football - International Tournament
14.15 Tennis - Wta Tournament
16.30 Biathlon - World Cup
17.15 News
17.30 Football - Antalya Cup 2002 - Live
19.30 Football - International Tournament - Live
21.30 Rally - 2002 Total-Dakar
22.00 News
22.15 Football - Antalya Cup 2002
23.45 Rally - 2002 Total-Dakar
0.15 News
0.30 Close

**BBC PRIME**

0.05 TLZ: »Secret Agent«
1.00 TLZ: »Future Fantastic – Brave New Body«
2.00 TLZ: »Philosophy In Action – Debates About Boxing«
2.30 TLZ: »The Emperors Gift«
2.55 TLZ: »Computing And Classics«
3.00 TLZ: »Wembley Stadium – Venue Of Legends«
3.30 TLZ: »Blue Haven«
3.55 TLZ: »Science Bites – The Leopard's Spots«
4.00 TLZ: »Troubleshooter – Back In Business – What Now, Guru?«
4.40 TLZ: »Shakespeare Shorts – Twelfth Night«
5.00 TLZ: »Talk French«
5.15 TLZ: »Talk French«
5.30 TLZ: »The Ozmo English Show«
6.00 Smart Hart: »Textures«
6.15 Playdays
6.35 Get Your Own Back
7.00 Ready Steady Cook
7.45 Garden Invaders
8.15 House Invaders: »Wigston
8.45 Bargain Hunt
9.15 Animal People: »Gladys The African Vet«
9.45 Vets In The Wild
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Timelash«
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthropp Investigates: »A Minor Operation«
13.30 Ready Steady Cook
14.15 Smart Hart: »Textures«
14.30 Playdays
14.50 Get Your Own Back
15.15 TOTP Eurochart
15.45 The Naked Chef: »The Bard«
16.15 Charlie's Garden Army: »Raglan School«
16.45 Miss Marple: »Nemesis«
17.45 The Weakest Link
18.30 Doctors
19.00 Eastenders
19.30 Best of British: »Lenny Henry«
20.05 Dalziel and Pascoe: »Bones And Silence«
21.00 A Bit Of Fry And Laurie
21.30 Ex-Wives
22.30 The Big Trip
23.00 Casualty

**BBC WORLD**

0.00 BBC News
0.30 HARDtalk (r)
1.00 BBC News
1.30 Holiday (r)
2.00 BBC News
2.30 Reporters (r)
3.00 BBC News
3.30 Asia Today (r)
3.45 World Business Report (r)
4.00 BBC News
4.30 HARDtalk
5.00 BBC News
5.30 World Business Report
6.00 BBC News
6.30 World Business Report
7.00 BBC News
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News
8.30 Holiday (r)
9.00 BBC News
9.30 Australia Direct (r)
10.00 BBC News
10.30 East Asia Today
10.45 Sport Today
11.00 BBC News
11.30 HARDtalk (r)
12.00 BBC News
12.30 World Business Report
12.45 Sport Today
13.00 BBC News
13.30 Top Gear (r)
14.00 BBC News
14.30 Australia Direct (r)
15.00 BBC News
15.30 Asia Today
16.00 BBC News
16.30 HARDtalk (r)
17.00 BBC News
17.15 World Business Report
17.30 Talking Movies (r)
18.00 BBC News
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News
20.30 Click Online
21.00 BBC News
21.30 World Business Report
22.00 BBC News
22.30 Panorama
23.00 BBC News
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

**TV3**

5.30 Børne-hjørnet med Disney
7.00 TV-shop
8.00 Hvide løgne
8.25 Ricki Lake
9.15 Ricki Lake (G)
10.10 Horton-sagaen (G)
11.00 Horton-sagaen
11.50 Panter-tanter
12.20 Vild med dig
12.50 Pæn pige – sej sild
13.20 Julebio: Den fineste gave
13.20 Baywatch Hawaii
14.15 Charlie's Angels
15.10 Susan – sød og single
15.40 7 Days
16.35 Ricki Lake
17.30 What about Joan
18.00 Sabrina - skolens heks
18.30 Alle tiders barnepige
19.00 George – den gæve liansvinger
20.40 Sex and the city
21.15 Dokumentar: Tvillinger
22.25 Vores værste år
22.55 Simpsons
23.25 Nash Bridges
0.25 Guys like us
0.55 Ricki Lake (G)
1.45 Drøm videre
2.15 Vores værste år (G)
2.40 Træneren
3.05 Simpsons
3.30 Sunset Beach
4.15 Godnat

**ÚF**

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur - Jóannes Johannesen í Dali lesur
07.15 Barnaløtan - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
07.30 Tíðindi
07.35 Morgunrásin - Dia Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
08.00 Tíðindi
08.03 Morgunrásin
09.00 Tíðindi
09.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættis
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e) - Jóannes Johannesen í Dali lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
10.09 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e) - Sigmar Bláberg leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum- Alexander Samuelsen stílar fyri
18.00 Barnaløtan (e)- Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Tilvera- Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo- Kári Olsen stílar fyri
20.30 Bør Børson- Marius Johannesen lesur 3. part av framhaldssøgu eftir Johan Falkberget.
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur- Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Ljóðmúrurin- Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

## HUndir illgruna 1:4

SVF Hóskvøldið kl. 22.40

– Virðislønt ensk krimirøð frá 1991
Kriminalinspektørurin Jane Tennison kennir seg forfjónaða, tá ið starvsfelagi hennara John Shefford fær til uppgávu at standa á odda í málinum um tað ræðuliga morðið á eina skøkju. Tá ið Shefford so doyr av hjartasjúku, endar málið á borðinum hjá Jane, men starvsfelagar hennara dylja ikki fyri, at teir halda lítið um at hava eitt konufólk til leiðara. Helen Mirren fekk hópin av virðislønum fyri leiklutin sum høvuðspersónurin í hesi vælumtóktu røðini.

## Vald andanna

SVF Hóskvøldið kl. 23.30

–
Yvirnáttúrligar hendingar í lívinum
Hvat var tað sum hendi á møtinum við nigerianska prestinum Charles Ndifon, táið Roger Pedersen (í Vald Andanna 3) varð grøddur fyri eygnabrekið? Vóru tað guddómligar kreftir sum broyttu náttúrulógirnar og rak út illar andar? Ella eiga fólk sjálvi ókendar sálarligar kreftir, sum eru førar fyri at lekja okkum — bara vit eru nóg trúgvandi? Og hvussu ber tað til at voodoo virkar og fólk doyggja, tá íð ilt verður biðið yvir tey? Alt hetta fæst svar uppá í hesari sendingini, har tveir sera ymiskir serfrøðingar kjakast um Vald Andanna. Annar er Bobby Zachariae, professari í krabbasjúkum og sálarstøðu á Unversitetssjúkrahúsinum í Århus, sum hevur granskað í ókendum kreftum í sinninum.

## Sex & the City

Carrie og politikarin Bill fáa trupulleikar tá hann knappliga spyr um hon kann uppfylla hansara ósjarmerandi seksuellu dreymar. Ein maður við lágari borgaratign fangar uppmerksomheitina hjá Samanthu. Tað er ikki júst hennara stílur, men hon verður ørkymlað tá tað vísir seg, at hann er eitt villdjór í songini. Charlotte byrjar brádliga herferðina um at verða gift hetta árið, meðan Miranda fær kaldar føtur um, at Steve vil, at tey skulu vera eitt alment par...



TV3 Hóskvøldið kl. 20.40

**ÚF**

## Morgunlestrar
**7. – 12. januar**

***Jóannes Johannesen, í Dali lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**
**Mánadagin 7. januar:**
nr. 137 Fagur himin er at sjá
mika 7,8
nr. 131 Eg rósu upp sá næla
**Týsdagin 8. januar:**
nr. 45 Hvør Harran eina letur ráða
Es. 6,11
**Mikudagin 9. januar:**
nr. 26 Alveldis drottur
Es. 6,8
nr. 320 Ger tað sindrið, tú kanst
**Hósdagin 10. januar:**
nr. 264 Brót gjøgnum ský mær trongd at linna
Es. 44,26
**Fríggjadagin 11. januar:**
nr. 462 So víða um lond, sum sólin hon sær
Es. 33,26
**Leygardagin 12. januar:**
nr. 44 Lít allar tínar leiðir
Jer. 33,26

**Rás 2**

09:45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Leysaløtan (e)
Endursending frá í gjár
Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
11:00 Tónleikur
12:00 Tíðindi og kunngerðir
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan
Heilsur frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi og kunngerðir
15:15 Leysaløtan - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
16:00 Tónleikur
17:00 Norðlýsið - Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18:00 Tíðindi og kunngerðir
18:15 Tónleikur
19:00 Orð á leiðini (EvR)
Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og kunngerðir
21:15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Tónleikur
22:00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. - Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

**Lindin**

13.00 Byrjan — Dagsskráin verður lisin
13.05 Bankabók Trúarinnar — eftir C.H.Spurgeon
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/M.C.Restorff (e)
14.30 Tónleikasending fyri børn
15.00 Horizon Star v/Stellu Zachariassen (e)
18.00 Dagsins orð eftir Svenning av Lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending
20.00 Tónleikasending fyri børn
20.30 Okkara dagliga breyð (e)
20.40 Møtilýsingar
21.00 Bankabók Trúarinnar — eftir C.H.Spurgeon
21.05 Bønarlinjan beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana.
Vit gevast uml. á middnátt við Dagsins Orð eftir Svenning av Lofti



# Eyðun og Terji á toppinum

Eyðun og Terji stjólu myndina, tá Chase fór á pallin fyri fyrstu ferð í fleiri ár. Hittini hjá teimum teimum báðum popparunum fingu høllina upp á kók, og so var trupult hjá Chase at fara á pallin



Leygarkvøldið var árliga nýggjárskonsertini, sum Kyndil skipar fyri í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn. Hesaferð vóru bólkarnir á konsertini tríggir í tali, og eingin ivi var um, at Chase skuldi verða høvuðsnavn.

Rockbólkurin, sum ferð eftir ferð bergtók konsertáhoyrarar fyri 10 árum síðani, skuldi nú aftur royna seg á pallinum. Við eini nýggjari fløgu í rygginum skuldi bólkurin seinast upp á pallin at spæla. Men tað gekk ikki rættiliga eftir vild hjá teimum Chase. Vit venda aftur til hetta seinni.

Okkurt um 1100 fólk vóru til konsertina, og fyri fyrstu ferð var tað Lognbrá, sum lat ljóðútgerðina á konsertini. Tað komu teir væl frá.

### Góð byrjan

All That Rain legði fyri á konsertini, og hóast klokkan bara var hálvgum ellivu, so kláraði bólkurin væl at loysa truplu uppgávuna at spæla fyrst á kvøldinum.

Teir løgdu harðliga fyri við góðum rocktónleiki og fýrverki, og tónleikurin var tann eyðkendi rocktónleikurin, sum bólkurin dugir so væl at framføra.

Teir spældu bæði kopiløg og sítt egna tilfar, og sum ikki einaferð eydnaðist teimum at fáa lív í fjøldina.

Einu løtuna høvdu teir ein gestatónleikara á pallinum. Tað var Fríði Øster, sum spældi trummur, meðan vanligi trummuspælarin, Henning Nicodemussen, tók mikrofonina í hendi og sang ein sang.

Hóast sangarin og gittarspælarin í bólkinum er skiftur út, so hevur bólkurin framvegis frískan hugburð til tónleikin, og teir spæla væl.

### Sigursgongd

Um eitt tíðina fóru Eyðun og Terji á pallin við sínum bólki, og teir høvdu eitt ordans kvøld. Við góðum tónleikarum sum Rógva á Rógvu, Magnus Johannesen, Petur Hans Niclasen, Bjarka Meitel og Kim Hansen í bólkinum var tað lag á manni at spæla gomlu slagararnar. Ein fyri og annan eftir.

Mitt í øllum hoyrdist óvæntað gittarljóð úr hátalarunum, og gittarspælarin á pallinum nart ikki streingirnar. Forkláringin var hon, at gittarspælarin í Moirae, Hjalti Joensen, kom úr hinum endanum av høllini við gittarini um hálsin og tráðleysum sambandi við anleggið.

Hann var ynsktur vælkomin á pallin, og so trivu teir í Hvussu kann eg vita, sum Moirae gav út fyri nøkrum árum síðani. Tað gjørdist til meira av Moirae, áðrenn Eyðun og Terji rundaðu sína framførslu av við jokarum sum Eros og 80'ini.

Tað var óført lag á teimum mongu áhoyrarunum, meðan Eyðun og Terji spældu, og her var talan um eina merkisverda góða framførslu hjá teimum royndu tónleikarunum. Eitt stórt kvøld hjá teimum.

Hóast nógv ungfólk vóru á konsertini, dugdu tey allar teir gomlu sangirnar hjá Eyðuni og Terja, og tey sungu væl við.

### Kavbáturin undan kavi

Tað var eingin løtt uppgáva hjá høvuðsnavninum á konsertini, Chase, at koma á pallin eftir hesa framførsluna, og tað skuldi eisini vísa seg, at teir høvdu ilt við at fáa sama lív í fjøldina á gólvinum.

Føroyingar dáma væl at hoyra sangir, sum teir kenna út og inn, tá teir fara á konsert, og tí skapti framførslan hjá Chase ikki sama hóvasták sum Eyðun og Terji. Chase spældi fyri tað mesta sangir av nýggju fløguni, Sum tjóvur á nátt, og tað tóktist, sum bert fáir av hesum sangum veruliga fangaðu fjøldina.

Helst er talan um so nýtt tilfar, at fólk ikki enn hava veruliga tikið tað til sín.

Frægasta løtan hjá Chase var, tá teir spældu eykalagið. Tá spældu teir helst best kenda sangin hjá tær, Fyrstu ferð, og tá hómaðist eina løtu veruligt lív í áhoyrarunum.

Musikalskt var einki í vegin við framførsluni hjá Chase. Teir spældu væl, og tað ljóðaði eisini gott. Men onkursvegna høvdu áhoyrararnir verið á toppinum saman við stóra bólkinum og kendu sangunum hjá Eyðuni og Terja beint frammanundan.

Samanumtikið ein góð konsert, har høvuðsnavnið stóð eitt sindur í skugganum av 80'ara hittum hjá Eyðuni og Terja.



